## Grækarismessuhaldið í Klaksvík í nýggjum hami

Á Grækarismessu eru vit von við skrúðgongu, skótar, hornorkestur og eina røðu, ið bjóðar tjaldrinum og várinum vælkomnum, men í ár verður ein roynd gjørd at hátíðarhalda Grækarismessuna í Klaksvík á ein øðrvísið hátt. Tað var í 1952, at Klaksvíkar Hornorkestur tók stig til at skipa fyri grækarismessuhaldi, og síðani hevur dagurin verið hildin á hvørjum ári, antin sjálvan dagin 12. mars ella tann sunnudagin, ið liggur næstur 12. mars. Í ár verður eingin skrúðgonga. Grækarismessan verður flutt inn í KFUM, har Jónleif Johannesen, lærari, flytur fram røðu. Klaksvíkar Hornorkestur spælir marsjir og várløg, og tjaldurssangurin verður sungin. Skótarnir bjóða ein kaffimunn. Tiltakið byrjar kl. 15:00, sunnudagin



# drepur listina



*Tróndur Patursson, listamaður, umhugsar at rýma av landinum, tí her er so illa liviligt hjá professionellum listafólkum*



*Av berum politiskum støðuloysi fór frálíka Listastevnan fyri bakka, hóast listarligi stimburin frá henni merktist allastaðni, harmaðist Carl Jóhan Jensen, rithøvundur*



*Hetta kopiveldið, sum ræður í føroyskari list, má steðga, ávaraði Sunleif Rasmussen, komponistur*



*– Tora politikarar ikki at stuðla úrvalslistini, tí teir eru bangnir fyri at missa atkvøður hjá breiðu fjøldini?, spurdi Sjúrður Skaale, orðstýrari og stigtakari til fundin*

stevnuni, helt Carl Jóhan Jensen.

– Listastevnan lyfti veruliga støðið upp, tey árini hon var, har fólk høvdu høvi at uppliva list á hægsta støði. Tá Norðurlandahúsið ikki longur helt seg einsamalt kunna skipa fyri listastevnuni longur, høvdu politisku myndugleikarnir eitt gylt høvi at bjarga henni fyri lítlar pengar. Men tað vildi teir ikki, og man skuldi næstan trúð, at politikararnir vóru glaðir fyri at sleppa av við Listastevnuna

Sambært Carl Jóhan Jensen átti hetta kjakið ikki at verið so trupult, tí innast inni vita vit væl, hvat góð list er. Føroyingar uppliva nógva úrvalslist uttanlands og eru farin at seta somu krøv til heimligu listina.

### Bíð eftir politikararnum

Nú bíða vit so bara, til eisini politikararnir tora at taka støðu til úrvalslist og ítrívslist, legði Inger S. Sørensen afturat. Tað kann gott vera at søgan er full av dømum um listasøgufrøðingar, sum tóku feil, men dømini um makthavarar, sum tóku feil, eru nógv fleiri, minti hon á. Og sjálvt um politikararnir halda tað vera trupult at sameina eliter sjónarmið við fólksligan politikk, so kunnu teir verða noyddir at gera tað.

– Tí tað er longu gingið galið. Trúgvin hjá politikararnum uppá egnar førleikar at stýra listini hevur spælt fallitt. Tað kann verða trupult at vita, hvussu man skal stuðla listarligari menning, men at lurta eftir teimum, sum vita nakað um list, merkir á ongan hátt, at vit harvið missa fólksligu mentanina.

Tvørturímóti, legið listfrøðingurin afturat. Tað einasta vit vita við vissu er, at um yrkislistin má geva upp andan, so kódnar fólksliga listin eisini.



*Við pallborðið sótu Inger S. Sørensen, listfrøðingur, Jenny Petersen, stjóri á Tjóðpallinum, og Oddfríður M. Rasmussen, formaður í Listafólkasambandinum*